**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1336**
**Tíðarskeið: 14-25/8 2013**

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Regin Kristiansen, Lis Larsen, Poul Vestergaard og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Somu upplýsingar skuldu eisini fáast til vega av longu og brosmu. Av svartkjafti skuldu fyri báðar túrarnar tilsamans takast 150 nytrur av smáttfallandi fiski. Av makreli og sild skuldu frystast í mesta lagi 5 stk. pr. støð. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Magakanningar skuldu eisini gerast, serliga av toski, hýsu og upsa. Aðrir lívfrøðiligir prøvar kundu takast – hesum skipaði toktleiðarin fyri.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur. Hitamátari at seta á lemmarnar (Minilogg).




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Hetta er 18. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. 133 trolstøðir vórðu tiknar á tí fyrra túrinum, so til hendan túrin vóru 67 trolstøðir eftir; tær lógu yvirhøvur norðan- og eystanfyri.
Farið varð av Havnini stutt fyri midnátt tann 15/8, og kastað varð fyrstu ferð um 2-tíðina tann 16/8 norður úr Kallinum (øki I, puntur 19). Kl. $15^{00}$ tann 21/8 var seinasta støðin á túrinum tikin (eystanfyri, øki VII, puntur 44), og so varð siglt inn á Havnina, har vit komu kl. $20^{00}$, og yvirlitstrolingin á sumri 2013 var við hesum at enda komin.
Túrurin sum so gekst væl, og tað eydnaðist at taka allar tær ætlaðu 67 støðirnar. Tó máttu 2 støðir takast umaftur, tí vit komu fastir. Eitt yvirlit yvir allar støðir á yvirlitstrolingunum á sumri er í túrætlanini fyri hendan túrin (1336) og á Mynd 1.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 1336

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Longa | Brosma | Lýrur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 287 | 58 | 292 | 70 | 328 | 59 | 63 | 25 | 5 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 1000 |
| Tal á magum tilsamans: | 187 |

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum. Umframt tey í talvu 1 nevndu sløg, so vórðu prøvar av sild og makreli frystir til nærri kanningar í landi.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miðað verður eftir, at túrurin er klárur at leggja í basu í november.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá báðum túrunum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Í talvu 2 er tó eitt yvirlit yvir øll sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum, hvussu nógv varð fingið av hvørjum slagi, og á hvussu nógvum støðum tey vórðu fingin. Mest varð fingið av upsa, og síðani komu hýsa, lítli kongafiskur, svartkjaftur, toskur, gulllaksur, hvítingsbróðir og longa. 41 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt høgguslokk (mat-høgguslokkur og Eledone (8-armar)), Jákupsskel, rækju og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, deyðar skeljar o.a. Um hugt verður at, hvussu títtleikin er av teimum ymsu sløgunum, t.e. á hvussu nógvum støðum, tey koma fyri, so varð upsi fingin á 84% av teimum 67 støðunum. Síðani koma m.a. lítli kongafiskur og hvítingsbróðir (78%), svartkjaftur (73%) og toskur (72%).
Verða báðir túrarnir á sumri lagdir saman, so vórðu 51 fiskasløg veidd tilsamans umframt hummara, rækju, Jákupsskel, 3 sløg av høgguslokki og skrambul; hetta er nakað færri sløg enn vanligt. Mest varð fingið av upsa, og síðani koma hýsa, lítli kongafiskur, hvítingsbróðir, svartkjaftur og toskur. Upsi varð fingin á 91% av støðunum, hvítingsbróðir á 81%, toskur á 82%, lítli kongafiskur á 73% og hýsa á 72% av støðunum.

Við at bera saman við stovnsmetingarnar, ið verða gjørdar á hvørjum ári, og við veiðutøl hjá fiskiflotanum (veiða upp á roynd), er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar eru fyri, m.a. upsi. Á mynd 2 er

veiðan pr. støð av úrvaldum sløgum frá báðum túrunum í summar víst samanborið við túrarnar á sumri undanfarin ár. Nevnast skal, at av tí at hesi úrslit eru í vekt og ikki í tali, so vísa tey ikki, hvussu tilgongdin hevur verið seinastu 2 árini. Eisini skal viðmerkjast, at úrslitini fyri summi fiskasløg í 2012 ikki beinleiðis kunnu samanberast við hini árini, tí at kanningarnar tá blivu gjørdar 5 vikur seinni enn vanligt vegna umvælingar av Magnusi Heinasyni. Hetta ávirkar serliga úrslitini fyri ferðandi stovnar sum eitt nú makrel og rossamakrel.

Fyri tosk hevur lítið verið at fingið síðani 2003, og serliga árini 2006-2008 var lítið at fáa. Í 2009-2011 var aftur meira at fáa vegna batnandi tilgongd; vantandi var, at stovnurin fór at vaksa enn skjótari vegna góðan gróður í 2008-2010, men so tykist ikki at vera. Úrslitið í ár var heldur frægari enn í fjør. Úrslitini fyri hýsu hava verið støðugt minkandi síðani 2002, og seinastu árini hevur veiðan verið sera lítil; 2009-árgangurin í 2011 (2 ára gomul hýsa) er nakað betri enn árgangirnir undan tí, men lítið sást til 2010- og 2011 árgangirnar. 2012-árgangurin tykist frægari enn hesir báðir.

Hóast úrslit viðvíkjandi upsa frá tílíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, so benda tølini á, at stovnurin hesi seinastu árini er nakað minni enn árini frammanundan. Stovnsmetingarnar í apríl-mai vístu tó, at upsastovnurin, hóast í minking, enn var hampuliga væl fyri í 2012. Avgerandi fyri gongdina næstu árini verður serliga, hvussu tilgongdin fer at verða, og ábendingar eru um, at hon ikki er so galin.

Longa og brosma tykjast at vera væl fyri, kanska eisini reyðsprøka. Hvítingsbróðir er væl fyri hóast væl minni enn metárini 2009-2011, og er hetta eftir øllum at døma vegna minni tilgongd seinastu árini. Svartkjaftur hevur verið á sera lítlum støði í nógv ár, men ein lítil vøkstur hevur verið síðan 2012; sera positivt fyri svartkjaft er, at nøgdin av 0- og 1-ára gomlum fiski nú er munandi betri enn árini frammanundan.

Nógv hevur verið tosað um makrel í seinastuni, og hóast yvirlitstrolingarnar verða gjørdar við einum lítlum botntroli, so sæst, at nøgdin av makreli er vaksin nógv síðani 2006, og bæði í 2011 og í ár bragdaði rættiliga í, og sera sannlíkt er, at nøgdin í 2012 hevði verið á sama støði, um kanningarnar tá vórðu gjørdar um somu tíð sum vanligt. Eisini rossamakrelur er í vøkstri, og munandi meira varð fingið av sild enn árini frammanundan; tað mesta av hesi sild var komið upp undir gýting, og nakað var gýtandi, serliga eystanfyri. Av gulllaksi, ið seinastu árini hevur verið hampuliga væl fyri, varð lutfalsliga lítið fingið í ár.

Havstovan, 29. august 2013

*Jákup Reinert*

Talva 2. Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á MH túri nr. 1336

| Fiskaslag | Veiða, kg | Veiða pr støð, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|---|
| Upsi | 5275.659 | 78.741 | 84 |
| Hýsa | 3883.316 | 57.960 | 63 |
| Lítli kongafiskur | 3510.253 | 52.392 | 78 |
| Svartkjaftur | 3435.288 | 51.273 | 73 |
| Toskur | 2364.793 | 35.295 | 72 |
| Gulllaksur | 1696.259 | 25.317 | 58 |
| Hvítingsbróðir | 1601.123 | 23.897 | 78 |
| Longa | 1519.367 | 22.677 | 54 |
| Makrelur | 786.754 | 11.743 | 43 |
| Stóri kongafiskur | 739.939 | 11.044 | 48 |
| Svartkalvi | 732.164 | 10.928 | 18 |
| Blálonga | 529.510 | 7.903 | 28 |
| Trantkongafiskur | 467.090 | 6.971 | 21 |
| Sild | 384.237 | 5.735 | 55 |
| Rossamakrelur | 325.246 | 4.854 | 22 |
| Tunga | 304.313 | 4.542 | 45 |
| Tindaskøta | 285.074 | 4.255 | 18 |
| Reyðsprøka | 218.560 | 3.262 | 34 |
| Brosma | 195.425 | 2.917 | 54 |
| Mathøgguslokkur | 142.767 | 2.131 | 24 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 109.699 | 1.637 | 10 |
| Hvítingur | 86.494 | 1.291 | 16 |
| Havtaska | 80.131 | 1.196 | 16 |
| Lítla brosma | 75.184 | 1.122 | 9 |
| Lýrur | 67.250 | 1.004 | 3 |
| Hvítaskøta | 58.520 | 0.873 | 6 |
| Sandsprøka | 54.588 | 0.815 | 27 |
| Skrambul | 51.306 | 0.766 | 31 |
| Skøta | 38.740 | 0.578 | 3 |
| Silvurmurtur | 37.894 | 0.566 | 19 |
| Knurrhani | 17.246 | 0.257 | 10 |
| Blágómur | 16.160 | 0.241 | 1 |
| Hvassasprek | 16.035 | 0.239 | 10 |
| Liri | 14.620 | 0.218 | 3 |
| Úlvfiskur | 10.770 | 0.161 | 4 |
| Glýsufiskur | 5.436 | 0.081 | 4 |
| Lálla | 4.077 | 0.061 | 4 |
| Eledone | 1.852 | 0.028 | 6 |
| Jákupsskel | 1.835 | 0.027 | 3 |
| Kjaftsvarti hávur | 1.205 | 0.018 | 1 |
| Nebbasild | 0.815 | 0.012 | 1 |
| Glaskvoysa | 0.700 | 0.010 | 1 |
| Stóra nebbasild | 0.646 | 0.010 | 1 |
| Bláriddari | 0.201 | 0.003 | 1 |
| Rækja | 0.087 | 0.001 | 1 |
| Murrikrutt | 0.073 | 0.001 | 4 |

**Talva 3.** **Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á sumri 2013.**

| Fiskaslag | Veiða, kg | Veiða pr støð, kg | Støðir við fiski, % |
|---|---|---|---|
| Upsi | 20393.829 | 101.969 | 91 |
| Hýsa | 12019.351 | 60.097 | 72 |
| Lítli kongafiskur | 11365.161 | 56.826 | 73 |
| Hvítingsbróðir | 8881.107 | 44.406 | 84 |
| Svartkjaftur | 8737.506 | 43.688 | 61 |
| Toskur | 7786.839 | 38.934 | 82 |
| Makrelur | 4323.466 | 21.617 | 44 |
| Longa | 4199.234 | 20.996 | 57 |
| Gulllaksur | 3521.646 | 17.608 | 51 |
| Rossamakrelur | 2829.795 | 14.149 | 37 |
| Stóri kongafiskur | 1709.012 | 8.545 | 41 |
| Trantkongafiskur | 1441.566 | 7.208 | 11 |
| Svartkalvi | 1326.602 | 6.633 | 7 |
| Havmús | 1039.666 | 5.198 | 10 |
| Hvítingur | 983.412 | 4.917 | 23 |
| Tunga | 754.488 | 3.772 | 49 |
| Blálonga | 742.743 | 3.714 | 17 |
| Brosma | 659.968 | 3.300 | 45 |
| Knurrhani | 639.797 | 3.199 | 27 |
| Sild | 634.194 | 3.171 | 39 |
| Reyðsprøka | 494.320 | 2.472 | 31 |
| Havtaska | 408.447 | 2.042 | 20 |
| Skrambul | 407.077 | 2.035 | 56 |
| Hákelling | 393.099 | 1.965 | 1 |
| Tindaskøta | 368.209 | 1.841 | 11 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 363.817 | 1.819 | 18 |
| Silvurmurtur | 287.700 | 1.438 | 21 |
| Mathøgguslokkur | 250.035 | 1.250 | 18 |
| Lítla brosma | 177.241 | 0.886 | 8 |
| Skøta | 175.325 | 0.877 | 6 |
| Sandsprøka | 156.932 | 0.785 | 25 |
| Kalvi | 118.200 | 0.591 | 1 |
| Halahvassa skøta | 87.600 | 0.438 | 2 |
| Kjaftsvarti hávur | 81.320 | 0.407 | 4 |
| Lýrur | 78.555 | 0.393 | 3 |
| Lálla | 76.932 | 0.385 | 11 |
| Hvítaskøta | 58.520 | 0.293 | 2 |
| Hvassasprek | 54.026 | 0.270 | 17 |
| Agnhøgguslokkur | 36.845 | 0.184 | 2 |
| Glaskvoysa | 31.431 | 0.157 | 8 |
| Búksvarti hávur | 26.772 | 0.134 | 3 |
| Blágómur | 26.715 | 0.134 | 1 |
| Steinbítur | 19.919 | 0.100 | 2 |
| Liri | 14.620 | 0.073 | 1 |
| Glýsufiskur | 11.080 | 0.055 | 3 |
| Úlvfiskur | 10.770 | 0.054 | 2 |
| Eledone | 7.416 | 0.037 | 3 |
| Jákupsskel | 5.885 | 0.029 | 2 |
| Nebbasild | 1.509 | 0.011 | 2 |
| Hummari | 0.700 | 0.004 | 2 |
| Stóra nebbasild | 0.646 | 0.003 | 1 |
| Murrikrutt | 0.557 | 0.003 | 4 |
| Klingruskøta | 0.397 | 0.002 | 1 |
| Bláriddari | 0.371 | 0.002 | 1 |
| Gestfiskur | 0.292 | 0.001 | 1 |
| Streymsild | 0.139 | 0.001 | 1 |
| Blettutur floyfiskur | 0.095 | 0.0005 | 1 |
| Rækja | 0.087 | 0.0004 | 1 |




**<u>Mynd 2</u>**. Fyribils úrslit frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.




**Mynd 2 (framhald)**. Fyribils úrslit (veiða pr. støð, kg) frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1996 fyri úrvald fiskasløg.